# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 22.02.2016 kl. 17.30 |
| Á fundi: | Trúgvi Gudmundarson<br>Rúni Thomsen<br>Magni Bertholdsen<br>Eyðfinn Debes<br>Martin í Nesi<br>Niels J. Thomsen<br>Niels Olaf Eyvindsson (fyri Jóhan Eli Poulsen) |
| Ikki møtt: | |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – kemur á skrá sum mál nr. 10.
Málini hjá Trivnaðarnevndini verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum.

1. **Umsókn um stuðul til dokumentarfilmin ”Svart Gull”.**
   Samtykt varð at útseta málið til komandi fund.

2. **Umsókn um stuðul til innandura rógving í Boston frá Dánjal Martin Hofgaard.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við 5.000,-.

3. **Umsókn um stuðul til námsferð frá 8. flokki í Hvalbiar skúla.**
   Søkt verður um stuðul til námsferð til Íslands. Samtykt varð at stuðla við kr. 500,- fyri hvønn persón í ferðalagnum, ella kr. 4.000,-.

4. **Eftirskúlin – skriv frá Niels Olaf Eyvindsson.**
   Niels Olaf vísir í skrivinum á samtykt, har fyrrverandi bygdarráð ger greitt, at tað virðir eina nýggja staðseting av eftirskúlanum í Suðuroynni, tá eftirskúlauppskotið um Hvalba ikki kundi gerast veruleiki. Samtykt varð eins og á seinasta bygdarráðsfundi at fáa ein fund við eftirskúla-nevndina um málið.

5. **Umsókn um umbýti millum matr. nr. 412a og 414a, Sandvík til ummælis.**
   Søkt verður í umsóknini um, at matr. nr. 412a letur uml. 975 m2 til matr. nr. 414a. Eigarir av báðum matr. nr. eru tær somu. Samtykt varð einmælt at viðmæla umbýtinum.

6. **Góðkenning av roknskapi fyri 2015 hjá Hvalbiar skúlabókasavni.**
   Roknskapurin fyri 2015 hjá bókasavninum varð einmælt samtyktur.

7. **Uppskot til løgtingslóg um val til kommunur í hoyring.**
   Bygdarráðið hevði onga viðmerking til uppskotið.

8. **Tilboð uppá ljósarmatur til Roynhøllina.**
   Tilboðið er áljóðandi kr. 40.000,- uttan MVG fyri 10 stk. ljósarmatur við tilhoyri. Samtykt varð, at Trivnaðarnevndin kannar málið nærri.

9. **Sambýlið – girðing um túnið (tilboð tøkt til fundin).**
   Ein meting av arbeiðsløn og tilfari liggur áleið kr. 15.000,-. Samtykt varð einmælt at fáa hetta gjørt.

10. **Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 10a, Hvalba.**
    Søkt verður um at sundurbýta tríggjar av fimm lutum til egið matr. nr. Talan er um lutirnar á ávikavist 28, 190 og 1.590 m2. Samtykt varð einmælt at viðmæla sundurbýtinum.

11. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd:**

- Umsókn um gravi- og byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 147f.
- Kunning um tilboð í sambandi við innaneftirlit í drekkivatnsskipanini.
- Tilboð uppá stýring til UV-tól frá Nomatek.

**Trivnaðarnevnd:**

- Ikki almenn mál.

**Vega- og havnanevnd:**

- Skriv í sambandi við loðsing fyri Hvalbiar havn.

**12. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Magni Bertholdsen):**

- Gravi- og byggiloyvi matr. nr. 147: Samtykt varð eftir tilmæli frá nevndini at geva gravi- og byggiloyvi til bilhús sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at bygt verður sambært byggisamtyktini.
- Kunning um tilboð drekkivatnsskipan: Drekkivatnskunngerðin, ið varð lýst fyri uml. 2 árum síðani, setir nýggj krøv til drekkivatnsskipanina og krevur eitt ávíst innaneftirlit. Samtykt varð, at John Hammer, arbeiðsformaður tekur neyðugu stigini til at uppbyggja eitt innaneftirlit við hjálp frá serkønum á økinum.
- Tilboð Nomatek: Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum frá Nomatek.
- Skriv til hagastýrið fyri Rókhaga: Samtykt varð at senda eitt skriv til Rókhaga um loyvi at grava fyri einum kaðali til ta heimastu kolaminuna eftir vatni.

**Vega- og havnanevnd (framløga Eyðfinn Debes):**

- Loðsing – Hvalbiar havn: Vega- og havnanevndin kannar málið um loðsing á Hvalbiarfirði og kemur við einum tilmæli til komandi fund.
- Neystagrund Páll og Bjartur Nielsen**:** Samtykt varð at avgreiða matrikulering í sambandi við umbýti av neystagrundunum í Nesi og á Hamranesi.

(Fyri afturlatnum hurðum):

**Trivnaðarnevnd (framløga Rúni Thomsen):**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.15

Trúgvi Gudmundarson Rúni Thomsen Magni Bertholdsen Eyðfinn Debes

Martin í Nesi Niels Jacob Thomsen Niels Olaf Eyvindsson